

*Julian, Oda, Aron, Rúni, Rebekka, Martin, Sjúrður, Benjamin eru bláa havið við fiskum í*

# Reyðhetta vitjar Millum Gilja



*Hildur, Poul Kjartan og Dánjal - ella Reyðhetta og úlvurin*

*Lagt til rættis: Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tað eru ikki bara fólkini í Ævintýrferðini og Meyla og Knøttur, sum duga at spæla sjónleik. Tað gera nógv børn í Føroyum. Og fyri stuttm vóru tað børnini í Býlingshúsinum Millum Gilja, sum vístu síni kynstur fyri foreldrum og syskjum.

Í góðum veðri framførdi tey útisjónleik um Reyðhettu. Børnini arbeiddu saman um at mynda ymisku persónarnar. Nakrar gentur spældu Reyðhettu, nakrir dreingir veiðimannin, og bæði Reyðhetta og omman passaðu í úlvin, tí hann var eisini spældur av fleiri.

Og so vóru livandi blómur, livandi summarfuglar og livandi hav við fiskum. Framførslan gekk væl, og bæði foreldur og starvsfólk kundu av røttum vera stolt.

Býlingshúsið Millum Gilja skipar á hvørjum árið fyri útisjónleiki, tí eitt skapandi útilív er partur av teirra stevnumiðið.



*Fríði, Kári og Bogi eru veiðimaðurin, sum bjargar Reyðhettu og ommuni úr búkinum hjá úlvinum*



*Summarfuglurin Fía*

Atlantic Brokers Ltd

**Stál línuskipið GULLBERG**



er til sølu - við loyvum.
Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 212238
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com